# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Bilarnir skulu verða eins góðir og Steinway klaverini. Tá prísurin er gloymdur, livir kvaliteturin víðari*

*Sir Henry Royce (annar av stovnarunum av Rolls Royce)*



*Jákup Bech Jensen á havnaøkinum í Uusikaupunki í Finnlandi. Nýggir Porsche Boxster klárir til avskipingar*

# Porsche Boxster so langt eygað rakk

**Síðan 1997 hevur finska bilverksmiðjan Valmet Automotive framleitt Porsche Boxster fyri Porsche AG í Týsklandi. Jákup Bech Jensen í Havn hevur sent okkum myndir av bilunum á havnaøkinum í Uusikaupunki í Finnlandi**



*Skipsmeklarin mátti ganga á ísinum út til skipini*

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Tá Jákup Bech Jensen í Havn arbeiddi sum skipsmeklari, kom hann víða um og sá mangt og hvat. Í 2004 var hann í Uusikaupunki í Finnlandi. Har tað var so kalt, at hann mátti ganga á ísinum fyri at koma umborð á tey ymisku skipini. Tá sá hann á havnaøkinum har Porsche bilar, so langt eygað rakk.

Hann helt hetta vera eitt løgið fyribrygdi men fann skjótt út av, at ein verksmiðja var í býnum, sum framleiddi bilarnar, sum síðani vóru útfluttir.

Talan er um verksmiðjuna Valmet Automotive, sum framleiðir Porsche bilar fyri Porsche AG í Týsklandi. Verksmiðjan varð sett á stovn í 1968 av fyritøkunum Finnish Valmet og Swedish Saab-Scania, og fekk tá hon tá navnið Saab-Valmet. Teir hava eisini framleitt t.d. Saab 900 Convertible.

Í 1992 yvirtóku finnar sjálvir verksmiðjuna, sum í 1995 fekk navnið Valmet Automotive. Síðan 1997 hava teir framleitt Porsche Boxster, og í 2003 kundu teir hátíðarhalda, at teir høvdu framleitt bil nr. 100.000. Árliga framleiðslan er um 20.000 bilar.



*Inni á Porsche verksmiðjuni í Uusikaupunki í Finnlandi. Árliga framleiðslan er um 20.000 bilar*



*Porsche Boxster uttan fyri Valmet Automotive sum framleiðir bilar fyri Porsche AG í Týsklandi*

· Umvæling av tryggingarskaðum og privat skaðum
· Vit umvæla øll bilmerki
· Klárgering til sýn
· Bremsur, útstoyt, stoytdoyvarar, rustarbeiði o.m.a.



Ring og fá eitt tilboð

**Sp/f Plátuverkstaðið**
Falkavegur · Tórshavn · Tel 321778 ella 221778
Teldupostur: plv@plv.fo